## Pólland skeyt Slovaki til HM

Við einum sigri á 1-0 á útivølli móti Póllandi vann Slovakia seg ti HM-endaspælið í einum bólki, sum annars taldi lond sum Kekkia og Slovenia. Tað skuldi tó eitt pólskt sjálvmál til, áðrenn HM-luttøkan varð tryggjað. Hetta kom longu í triðja minutti, tá Seweryn Cancarczyk beindi bóltin í egið net. Nummar tvey í bólkinum gjørdist Slovenia, meðan Kekkia púra óvæntað er heilt úti úr HM-myndini.



## Bendtner betalti gildið

Tað gekk hart fyri seg, tá danska fótbóltslandsliðið skuldi feirað HM-luttøkuna, sum varð tryggjað leygardagin. Sambært Se og Hør helt landsliðið til á B41 í danska høvuðsstaðnum, og tá rokningin fyri veitsluna kom, var hendan um tær 20.000 krónurnar. Ta rokningina tók Bendtner sær av, men tað skuldi bara mangla, tá hann sambært danska blaðnum hevði verið høvuðspersónur í veitsluni. Millum annað við at keypa champagnu, sum varð sprænd yvir liðfelagarnar.

### Rumenia-Føroyar 3-1 (1-0):

# Eitt mál gav ikki stig

**Føroyska liðið skuldi bæði hava mál og stig í gjárkvøldið, søgdu fleiri leikarar. Venjarin segði seg vóna tað sama. Málið fingu teir, men tá mótstøðuliðið ger trý av slagnum, so er røkkur einsamalla føroyska málið ikki til nakað sum helst**



rolant@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam



**Piatra Neamt, Rumenia:** Brian Kerr hevur gjørt greitt, at honum ikki hóvar tap. Heldur ikki tey heiðurligu, eins og Jónas Þór Næs førdi fram undan dystinum í móti Frankaríki.

Somuleiðis hevði Atli Gregersen sagt, at hann satsaði upp á ein sigur á Rumenia, meðan Jákup á Borg metti, at ein javnleikur als ikki var óhugsandi.

Bjartskygdir menn undan dystinum í móti einum liði, sum liggur 137 pláss frammanfyri okkum á altjóða styrkislistanum hjá FIFA.

Dysturin endaði 3-1 til Rumenia. Tað er eingin, sum kann siga, at sigurin ikki var uppiborin. Spurningurin er so, um Brian Kerr, Jónas Þór Næs, Atli Gregersen, Jákup á Borg og hinir, sum vóru av somu sannføring, eru meiri ella minni ørir í høvdinum.

Tað er møguligt, men tað er neyðugt, um tú sum pinkutjóð skalt hava stig í móti teimum stóru. Tað skulu vit eisini hava – og tey stigini hava vit fingið fýra av í hesi undankappingini.

Hon endaði í gjárkvøldið, men stigaveiðan heldur fram í næstu undankapping – líkamikið hvørji mótstøðuliðini eru.

Lúsingarnir koma – tað gera teir altíð og teir taka vit við. Sum til dømis leygarkvøldið í móti Frankaríki. Men dysturin í gjárkvøldið prógvaði, at føroyska liðið í roynd og veru kann spæla heilt hampiligan fótbólt, hóast ikki allir á liðnum raka dagin.

Tað er eitt stórt framstig!

### Ein kjansur og eitt mál

Men skulu stigini koma, so hava vit ikki ráð at gera somu mistøk sum í gjárkvøldið. Fyrsta málið er næstan eitt stórt mistak úr enda í annan. Jákup Mikkelsen skjýtur málspark út, og tríggjar statiónir seinni er mál.

Bólturin verður stútaður niðan í teirra høgra borð, har Varga sleppur at leggja inn um Atla Danielsen til Apostol, sum fær bóltin á brotsteigarmarkinum. Miðvallarleikarin ger tað einasta, hann í roynd og veru kann gera. Hann tekur eitt trekk við fyrstu røring inn í brotsteigin. Samstundis ger Atli Gregersen tað einasta, hann ikki skal gera. Hann kemur út í móti Apostol heldur enn at hanga eftir, og soleiðis glíður Apostol beint ígjøgnum føroysku verjuna.

Skotið er hart og gott, men vinkulin var rímiliga spískur og Jákup Mikkelsen átti at vart fyri við nærmaru stong.

Hinvegin hevði Jákup eina sera góða og kanska eitt sindur hepna bjarging løtu seinni, tá ein rumeni stjelur bóltin frá Fróða Benjaminsen, men skotið endar beint á Jákup Mikkelsen, sum stendur á rætta stað.

Fáar minuttir seinni var Fróði Benjaminsen aftur í sentrum. Hann fekk nøsina á eitt innlegg frá Símun Samuelsen, men tíverri var nøsin ikki nóg stór og bólturin broytti ikki stórvegis kós.

1-0 gjørdist eisini hálvleiksstøðan í dystinum, sum harvið var víðopin.

### Úr einum enda í hin

Í seinna hálvleiki vóru okkara mans eisini væl við. Fyrsta gjøgnumspælda álopið áttu føroysku leikararnir eisini, tá Rógvi Jacobsen, Jákup á Borg og Símun Samuelsen spældu seg ígjøgnum, tó uttan at nakað stórvegis spurdist burturúr.

Hetta var í 64. minutti og minuttin eftir, var mál í hinum endanum. Bóltur verður fluttur inn í føroyskabrotsteigin úr teirra høgru síðu. Atli Gregersen verður fyrstur á hesum og sparkar burtur, samstundis sum ein rumeni ger eitt lítið fríspark á hann.

Harvið missir hann nøkur fet og